gult2 cyan2 magenta2 svart2






gult3 cyan3 magenta3 svart3



# Stríðið fyri Ósánni heldur fram

**Áhugabólkurin Síl í Ósánna fekk dyggan stuðul á framsýning á norðoyastevnu, og borgarstjórin heldur, at talan er um sera áhugavert tiltak**

UMHVØRVI
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Áhugabólkurin Síl í Ósánna hevði á norðoyastevnu framsýning um Ósánna, sum áhugabólkurin ætlar aftur skal gerast ein rein á við lívi í.

Eftir framsýningina kennir áhugabólkurin seg styrktan í sínum arbeiði, og longu mánadagin var fundur við borgarstjóran í Klaksvík.

– Framsýningin var væl vitjað, og fólk vóru á einum máli um, at okkurt má gerast við Ósánna. Størsti parturin av fólkunum vórðu eitt sindur ovfarin, tá tey fingu at vita, hvussu ótespilig støðan í ánni er, sigur Abraham Mikladal, sum er ein av stigtakarunum til áhugabólkin.

– Vit ætla okkum at stríðast fyri okkara ætlan um fáa áina reina aftur, og vit fara at gera onkur átøk næstu tíðina, sigur hann.

### Fleiri møguleikar

Ósáin rennir miðskeiðis gjøgnum Klaksvík. Áin plagdi at verða ein rein á við lívi í, men seinastu nógvu árini hevur áin verið illa dálkað. Kloakkvatn rennur í ánna, og tað forðar fyri, at nakað lív kann verða í ánni.

– Tað eru fleiri møguleikar at reinsa ánna, og tað er eisini ymiskt, hvussu nógv arbeiðið kann kosta. Tað er tó umráðandi, at okkurt verður gjørt, sigur Abraham Mikladal.

Mánadagin hevði áhugabólkurin Síl í Ósánna fund við borgartstjóran í Klaksvík, og har varð tosað um ætlanina at reinsa ánna.

– Skal tað ber til at reinsa ánna, má kommunan spæla við. Kommunan má gera stóra arbeiðið, men arbeiðið at skapa hugna og fríðka um økið eru nógvir borgarar í býnum klárir at hjálpa til við, sigur Abraham Mikladal.

### Borgarstjórin áhugaður

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, er áhugaður í ætlanini hjá Síl í Ósánni, men hann kann ikki lova pengar upp á standandi fót.

– Eg hevði gjarna viljað latið pengar til ætlanina, men vit hava nógv átrokandi mál at loysa í býnum, og tí verður ætlanin við Ósánni partur av viðgerðini av komandi fíggjarætlan, sigur Steinbjørn Jacobsen.

– Eg haldi, at tað hevði verið framúr at fingið ánna reina aftur, og eg haldi eisini, at vit eiga at seta okkum eitt ítøkiligt mál um hetta. Gera vit ikki tað, er vandi fyri, at einki hendir, sigur hann.

Abraham Mikladal fegnast um orðini hjá borgarstjóranum.

– Men tað skulu pengar til, um áin skal reinsast, og vit kenna helst støðuna betri, tá fíggjarætlanin hjá kommununi fyri næsta ár er gjørd, sigur hann.

– Tað er ikki nóg mikið at seta 50.000 krónur av um árið til hetta endamálið, soleiðis sum gjørt hevur verið undanfarin ár. Upphæddin má minst tíggjufaldast, tí tað fer helst at kosta einar fimm milliónir at reinsa ánna.

# Rýma úr býnum at fundast



*Steinbjørn Jacobsen stendur á odda fyri nýggja meirilutanum í Klaksvíkar býráði, sum nú stríðist við sína fyrstu fíggjarætlan.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Meirilutin í Klaksvíkar býráði hevur leitað í friðarligar umstøður á Viðareiði at fundast um sína fyrstu fíggjarætlan**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Meirilutin í Klaksvíkar býráði arbeiðir í hesum døgum við síni fyrstu fíggjarætlan.

Millum tær mongu samrøðurnar og nevndarviðgerðirnar av fíggjarætlanini fyri næsta ár, hava tveir fundir eisini verið á Viðareiði. Seinni fundurin var beint fyri norðoyastevnu.

– Hetta er nýtt, men vit hava valt at leggja tveir fundir á Viðareiði, so vit hava kunna fundast í friði og náðum. Vit hava givið okkum góðar stundir at viðgera tey mongu málini, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

– Vit eru ein nýggjur meiriluti í býráðnum, og tí hava hesir fundir eisini verið brúktir til at samansjóða okkum betri, sigur hann.

### Avmarkaðar íløgur

Klaksvíkar kommuna kann gera íløgur fyri umleið 18 milliónir krónur næsta ár, og nógv er at brúka hesar pengarnar til.

– Nevndirnar hava hvør í sínum lagi mett um sín tørv fyri komandi ár, og nú verður tað upp til okkum at prioritera íløgurnar, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri.

– Tíðirnar eru soleiðis, at nógv halda okkum hava ovmikið at pengum, men soleiðis er ikki. Vit hava avmarkaðar møguleikar fyri íløgum, og tí verða vit noydd at velja og vraka.

### Nógv stórmál á skránni

Nógv mál verða viðgjørd, nú fíggjarætlanin skal leggjast fyri komandi árið.

– Vit verða noydd at halda fram við at betra um umstøðurnar í skúlunum, og havnaviðurskiftini eru eisini eitt átrokandi mál. Vit hava latið seinasta byggiloyvi á havnaøkinum, og nú er einki eftir at byggja á, sigur Steinbjørn Jacobsen.

– Barnaansingin er eisini eitt afturvendandi mál, og umvælingin av svimjihøllin fer eisini at kosta nógvar pengar.

Enn er meirilutin í býráðnum í Klaksvík ikki komin á mál í viðgerðini av fíggjarætlanini, og tað ganga ivaleyst fleiri vikur, áðrenn uppskotið um fíggjarætlan er klárt.

# Boðini væl hægri enn metingin

**Arbeiðið at gera svimjihøllina í Klaksvík í forsvarligan stand verður munandi dýrari, enn metingin legði upp til**

UMVÆLING
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Mánadagin vórðu boðini at gera fyrsta partin av umvælingararbeiðnum í svimjihøllini í Klaksvík latin upp.

Hóast talan var um almenna útbjóðing, komu bert tvey tilboð, og bæði vóru frá feløgum í Klaksvík. Boðini vóru væl hægri enn metingin av arbeiðnum.

– Hetta vísir, hvussu trupul støðan er í løtuni, tí øll hava ovmikið at gera, og tað ávirkar kostnaðin. Skilið var tað sama, tá arbeiðið at gera útstykkingina á Helnabrekku varð boðið út herfyri, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

Átrokandi er við umvælingum av svimjihøllini í Klaksvík, skal hon ikki verða stongd.



*Fyrsti parturin av umvælingararbeiðnum í svimjihøllini í Klaksvik verður munandi dýrari, enn metingin av arbeiðnum segði. Tilboðini, sum komu inn, vóru tvær milliónir omanfyri metingina*

### Tvær milliónir á muni

Ein umvælingarætlan er løgd fyri svimjihøllina, og fyrsti parturin av hesi ætlan skal tryggja, at høllin ikki verður stongd.

Fyrsta umvælingarstigið var mett at kosta um seks milliónir krónur, men lægsta boðið var um tvær milliónir hægri.

Kanjon bjoðaði sær at gera arbeiðið fyri 7,9 milliónir, meðan Klaksvíkar Byggivirkið gav tilboð upp á 8,1 milliónir.

– Nú fer umsitingin at kanna tilboðini, og síðani verða samráðingar tiknar upp við Kanjon, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri.

Fyrstu umvælingarnar eru átrokandi, og ætlanin er at arbeiðið skal byrja í summar.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu,
tá okkara elskaði maður, pápi, abbi og langabbi

**Tór Henriksen**

andaðist.

Takk til øll tey, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað. Ein serlig tøkk til prestin fyri troystarrík orð og til tykkum, ið hjálptu til á ymiskan hátt.

**Tóra**